## Eitt óløgi tveitti tríggjar mans á sjógv

**Teir fóru av Oyrargjógv eftir seyði norðuri í Urðini. 17 hugagóðir vágamenn.**

**Men lítið vistu teir tá, at hesin dagurin eins væl kundi endað sum ein feigdardagur, har ein ungur maður mundið sjólátist.**

**Eitt óvæntað óløgi koppaði jolluni, sum tríggir mans sótu í. Tveir teirra komu undan beinanvegin, men tann triði maðurin var helst kleimdur undir jolluni.**

**Støðan var so vónleys, at hann ta einu løtuna helt at hansara síðsta løta var komin.**

**Men við skjótum atburði og góðum sjómansskapi vórðu kortini allir menninir bjargaðir.**

**- Hetta var eitt Guds undur, sigur ein teirra sum var við henda týsdagin í farnu viku.**

**Lesið spennandi frásagnina um 13 ára gamla miðvágsdrongin, Tórður á Presttrøðni sum var umborð á jolluni, tá hon koppaði.**

# - Eg trúði bara at eg druknaði

**Tórður hvarv bara, tá jollan koppaði. Tað tók eina langa løtu, sum kanska bert vardi fá sekund, fyrrenn hann kom undan kavi aftur. – Eg helt, at eg skuldi drukna. Alt gongur so skjótt fyri seg, men eg trúði at mín síðsta stund var komin, sigur 13 ára gamli Tórður á Presttrøðni sum í farnu viku fór við øðrum monnum eftir seyði norðuri í Urðini. Teir hava roynt hetta ofta áður, men hesin dagurin kundi gjørst ein feigdardagur**

ÓHAPP

*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*- Gott, at alt endaði so væl sum tað gjørdi. Tað var eitt Guds undur at allir komu aftur á lívi! Vinstrumegin Wensil Nattestad, sum átti bátin; Kári á Presttrøðni sum átti sonin sum koppaði við jolluni, og Tórður sum átti eydnuna henda dagin*

**Miðvágur:** Hetta var ein týsdagur sum so mangir aðrir týsdagar í Miðvági. Fólk fóru til arbeiðis sum vanligt, og børnini vóru í skúlanum.

Tað eru kortini nakrir menn og unglingar sum ikki hava ein vanligan dag henda heystardagin. Teir hava sett hvørjum øðrum stevnu á Oyrargjógv henda fyrrapartin.

Teir vita, at í brattlendinum norðuri í Urðini, teir kalla, har ganga 12 seyðir, sum teir ikki enn hava fingið fatur á. Og tað hendir, hóast farið er langt út um hálvan oktober.

Í dag skal tað so vera. Líkindini eru hampilig, og tí verður avrátt at allir hesir 17 menninir skulu møtast á Oyrargjógv kl. 11. Nú skal seyðurin fáast til høldar.

Tað er ikki frítt, at menn eru spentir til hesa ferðina. Fleiri teirra hava roynt hetta áður, eisini 13 ára gamli Tórður, sum hóast sín unga aldur hevur verið her fleiri ferðir.

Hetta er mestsum bara ein avgreiðsluspurningur at reka hesar 12 seyðirnar oman móti sjóvarmálanum. Eftir fáum tímum eru menn aftur at landi í Oyrargjógv. Vanliga er tað so. Men henda týsdagin 18. oktober 2005 var tó munandi øðrvísi. Hetta kundi lættliga gjørst ein feigdardagur.

- Tíbetur spældi alt væl av. Og eg ivist onga løtu í, at Harrans hond var yvir okkum henda dagin. Tá vit fyrr fóru í Urðina eftir landi, so steðgaðu vit altíð á eina løtu í einum skarði. Vit lótu frið falla yvir okkum, og løgdu so alt í Harrans hendur.

- Tað gjørdi eg sjálvur eisini henda morgunin, áðrenn eg fór frá húsum. Eg legði dagin og okkum allar í Hansara sterku hendur, og tað vita vit, at Hann hoyrir okkara bønir, sigur Wensil Nattestad, sum eisini var við henda dagin.

### Nógv útliðið

Teir hava lurtað eftir veðurtíðindunum í útvarpinum henda týsdagin.

Sagt verður frá eysturætt og landsynningi ein stóran part av degnum, men at hann seinni um dagin skal hække upp í norðan. Eystan er góð ætt norðuri í Urðini, men tað er høgættin hinvegin ikki.

Út á fyrrapartin eru menn til reiðar at fara av Oyrargjógv. Seksæringurin, sum Wensil Nattestad er til flotaður og tá klokkan er farin beint av 11 leggja hesir 17 menninir frá landi. Bæði veðrið, ættin og sjóvarfallið eru við teimum henda dagin.

Tað er bert ein lítil løta at sigla norður á staðið, har hesir 12 seyðirnir hava gingið síðani í apríl mánaði. Ein hálvan tíma ella so.

Her er talan um 12 seyðir, sum 12 mans eiga. Vanliga fara teir eftir teimum um 20. september, men í heyst hevur viðrað so illa, at tað ikki hevur verið hugsingur um at fara eftir teimum fyrrenn nú.

Tað er nú ella aldrin við báti. Um tað ikki eydnast í dag, er helst ikki annað at gera enn at fáa hjálp frá tyrluni. Men nú er so ferðin byrjað, og her sæst urðin fyri framman.

Ein bátur liggur uttanfyri. Nakrir mans verða stjóraðir inn á land við eini jollu. Teir reka seyðirnar oman móti sjóvarmálanum, har seyður og menn verða stjóraði umborð aftur á seksæringin.

Soleiðis plagar tað at vera. Einfalt, trygt og skjótt avgreitt eftir minni enn einum tíma. Men soleiðis gekk ikki á heysti 2005.

### Tryggir vestar

Teir koma nú norður á Urðina og leggja síðani stilt uttanfyri. Hetta er vanlig mannagongd, tí menn vilja summa seg eina løtu, samstundis sum teir tosa um, hvussu farast skal fram í brattlendinum.

Teir kunnu við takksemi sanna, at har inni á landi kunnu teir síggja allar 12 seyðirnar. Eingin teirra er mistur, og tað munnu teir 12 eigararnir vera fegnastir um. Okkurt árið hava bæði tveir og tríggir seyðir vanta, tá raksturin kom fyri.

Umborð á seksæringinum gera teir nú klárt at fara í land. Teir eru altíð væl fyrireikaður og ikki minst væl útgjørdir til eina slíka ferð.

Hesaferð eru teir tó betri útgjørdir enn undanfarin ár. Teir hava altíð verið í bjargingarvestum, tá teir eru farnir við jolluni í land. Men hesaferð eru vestarnir spildurnýggir og av nýggjasta og besta slagi: Dettur maður á sjógv við vesti, so blæsist vesturin upp í somu løtu, sum sjógvur kemur á hann. Tað er ikki víst, at menn hugsaðu um tað týdningarmikla í hesum júst tá, men fáar minuttir seinni var tað júst hetta sum helst gjørdi sítt til at allir mans komu aftur á lívi.

Tá klokkan er farin at nærkast 1 verður jollan gjørd klár og teir fyrstu menninir fara í land. Umframt bjargingarvestin hava teir eisini eitt VHF samskiftistól við sær í land.

Tríggir mans verða stjóraðir í land hvørja ferð við hesi jolluni, sum er ein tríggjar metrar long dupultskinnað gummijolla. Eftir lítlari løtu eru teir 11 menninir komnir í land, teirra millum feðgarnir, 47 ára gamli Kári og Tórður á Presttrøðni, sum fyllir 14 ár mikudagin í næstu viku.

Hetta gongur alt uppá stás. Menn hava roynt hetta so mangan áður, og tí verður altíð við spenningi sæð fram til hesa løtuna at koma á land í Urðini.

Áðurnevndi, Wensil hevði sjálvur ætlað sæð við teimum í land henda dagin, men hann slapp snøgt sagt ikki. Tí, sum hann sigur: - Teir yngru vóru so spentir og so grammir at sleppa í land, at eg bleiv mestsum avtroðkaður hesa ferð, sigur hann við einum brosi.

Hinvegin so ásannar hann bara, at hetta er lívsins gongd: Teir yngru vilja sleppa í land at royna seg. Tað eru jú teir sum skulu halda hesum siðinum uppi í framtíðini. Soleiðis var eisini støðan, tá Wensil sum 13 ára gamal var fyrstu ferð



*- Eg legði dagin og okkum allar í Harrans hendur. Og Hann hoyrdi mína bøn, sigur Wensil Nattestad*